LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 30. oktober 2014
J.Nr.: LUM-80- 14/00005-10
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

viðvíkjandi klagu um handfaringina hjá Fíggjarmálaráðnum av umsókn um innlit í CIP-sáttmálan

Við skrivi, dagfest 4. februar 2014 hevur A, journalistur í Kringvarpi Føroya sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Eg vil hervið klaga Fíggjarmálaráðið til Løgtingsins Umboðsmann fyri ikki at lata innlit í sáttmálan millum landsstýrið og CIP, og fyri ikki endaligt at svara umsókn mínari um innlit.
>
> 3. januar bað eg um innlit í sáttmálan við CIP, eftir niðurstøðuna hjá løgmansskrivstovuni í desember 2013, har løgmansskrivstovan bað FMR um at taka innlitsumbønir uppaftur og lata innlit í partar av sáttmálauppskotinum. 10. januar frætti eg frá FMR, og tá skrivar FMR soleiðis: "Umbøn tín um innlit verður viðgjørd í løtuni, og væntandi verður innlit veitt í komandi viku". 17. januar frætti eg aftur frá FMR, og tá verður skrivað soleiðis: "Vegna stóra arbeiðsbyrðu her í ráðnum er viðgerðin av tínari innlitsumbøn ikki avgreidd enn. Miðað verður ímóti, at innlit verður veitt í komandi viku. Tori ikki at seta ein ávísan dag á, men vónandi ein av fyrstu døgunum í vikuni. Harmist seinkingina, og vóni at tú heldur mær til góðar."
>
> Síðan tá havi eg onki frætt frá FMR. Eg sendi teimum t-post mánadagin 3. feb og spurdi um málið, og boðaði frá, at eg fór at loyva mær at venda mær til LUM, um eg onki frætti aftur frá FMR. Eg havi onki frætt frá FMR, og loyvi mær tí at klaga handfaringina hjá FMR av umbøn mínari um innlit.
>
> Eg havi teldupostsamskiftið tøkt, og sendi tykkum tað fegin, um tit hyggja nærri at málinum."

Við einum ískoyti til hesa klagu hevur B, journalistur tann 12. februar 2014 sent umboðsmanninum soljóðandi teldupost:

> "Kvf (A) hevur kært um ov drúgva viðgerðartíð at fáa innlit í 'CIP-sáttmálan'. Henda kæra er um, at alt ov nógv er útstrikað, nú vit loksins hava fingið hann.

Sí viðheftu dokument. Vónandi hyggja tit upp á tann problematikkin. "

**Málsgongd**
Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 6. februar 2014, varð Fíggjarmálaráðið biðið um at greiða umboðsmanninum nærri frá viðgerðartíðini av hesum máli við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tann 27. februar 2014 sendi umboðsmaðurin Fíggjarmálaráðnum soljóðandi skriv:

> **"Viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 5. februar og ískoyti, dagfest 12. februar 2014**
>
> Umboðsmaðurin hevur fingið eitt ískoyti til klaguna um málsviðgerðartíðina hjá Fíggjarmálaráðnum av innlitsumbøn í CIP-sáttmálan. Klagarin hevur upplýst, at Fíggjarmálaráðið hevur givið innlit í CIP-sáttmálan, men ynskir at klaga, at ov nógv var útstrikað í sáttmálanum, sum innlit var givið í.
>
> Umboðsmaðurin hevur gjørt av at kanna hetta málið nærri. Fíggjarmálaráðið verður í hesum sambandi biðið um at greiða umboðsmanninum nærri frá hesum máli.
>
> Fíggjarmálaráðið verður í fyrsta umfari biðið um at lata umboðsmanninum til láns CIP-sáttmálan og skjalið frá D, professara dr. jur. í sambandi við viðgerð hansara av CIP-sáttmálanum. Harumframt verður biðið um at lata umboðsmanninum til láns (original ella avrit) viðmerkingarnar frá Innlendismálaráðnum (Løgmansskrivstovuni) og Copenhagen Infrastructure Partners (CIP) til innlitsáheitanina.
>
> Biðið verður um, at frágreiðingin og skjølini verða umboðsmanninum í hendi innan 3 vikur."

Tann 28. februar 2014 fekk umboðsmaðurin soljóðandi frágreiðing frá Fíggjarmálaráðnum:

> **"Frágreiðing um viðgerðartíðina av innlitsáheitan**
>
> Fíggjarmálaráðið fekk innlitsumbønina 3. januar 2014 og fór undir at viðgera hana.
>
> Fíggjarmálaráðið tekur undir við málsgongdini, ið klagarin hevur lýst í sínari klagu, dagfest 4. februar 2014.
>
> Áheitanin um innlit varð endaliga avgreidd frá Fíggjarmálaráðnum og send umsøkjaranum tann 11. februar 2014.
>
> Fíggjarmálaráðið viðgjørdi umsóknina við grundarlagi í løgfrøðiligum áliti, ið var umbiðið av Løgmansskrivstovuni.
>
> Í hesum áliti, ið D, professari í lóg, hevur gjørt, er niðurstøða viðvíkjandi heimildini at veita innlit í sáttmálan umframt ráðgeving í sambandi við, hvørjir partar av sáttmálanum, ið eftir hansara tykki, eru fyri innliti. Álitið við fylgiskjali liggur við hesari frágreiðing.
>
> D mælti í álitinum til, at Copenhagen Infrastructure Partners og Løgmansskrivstovan fingu høvi at gera sínar viðmerkingar, áðrenn innlitsáheitanin endaliga varð avgreidd.

Hesum tók Fíggjarmálaráðið undir við og setti seg í samband við CIP tann 10. januar 2014 og gav teimum høvi til at gera viðmerkingar til teir partar av sáttmálanum, ið D metti vóru fyri innliti. Freistin at svara varð sett til 15. januar 2014.

12. januar 2014 fekk Fíggjarmálaráðið svar frá advokati umboðandi CIP, at teir ynsktu longri freist at svara, og hesum játtaði Fíggjarmálaráðið. Freistin varð sett til 20. januar 2014.

17. januar 2014 fekk Fíggjarmálaráðið svar frá CIP og teirra viðmerkingar.

Fíggjarmálaráðið fór eftir hetta undir endaligu viðgerðina av innlitsáheitanini í sáttmálan, ið samanlagt taldi 51 blaðsíður, og skrivaði tann 27. januar til CIP, at Fíggjarmálaráðið nú var liðugt at viðgera innlitsáheitanina, at nøkur av teirra sjónarmiðum vóru tikin til eftirtektar, men at viðgerðin í høvuðsheitum var grundað á upprit frá D. Fíggjarmálaráðið gav CIP enn einaferð møguleika at gera sínar viðmerkingar, men legði áherðslu á, at hesar skuldu verða Fíggjarmálaráðnum í hendi skjótast gjørligt.

28. januar fekk Fíggjarmálaráðið endaligu viðmerkingarnar frá CIP, men hesar vóru ikki tiknar til eftirtektar.

29. januar fekk Løgmansskrivstovan endaligu viðgerðina av innlitsáheitanini við viðmerkingum frá CIP til ummælis og møguleika fyri at gera viðmerkingar.

29. januar fekk Fíggjarmálaráðið at vita frá Løgmansskrivstovuni, at hon einki hevði at leggja aftrat málinum.

Fíggjarmálaráðið harmast, at umsøkjarin ikki fekk nýggja fráboðan um, at málið dróg út. Hetta hevur ráðið fráboðað umsøkjara og greitt frá hví."

Við skrivi tann 8. juli 2014 sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til Fíggjarmálaráðið:

**"Viðvíkjandi klagu frá A, Kringvarp Føroya, dagfest 5. februar og ískoyti, dagfest 12. februar 2014**

Umboðsmaðurin hevur móttikið skjølini hjá Fíggjarmálaráðnum við telduposti, dagfestur 24. mars í ár, og hevur nú gjøgnumgingið tey.

Tað framgongur av avgerðini hjá Fíggjarmálaráðnum, dagfest 11. februar 2014, at Fíggjarmálaráðið hevur tikið avgerð um at lata klagaranum lutvíst innlit í sáttmálan, vísandi til § 13, stk. 1, nr. 5, sambært § 13, stk. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001.)

> § 13, stk. 1, nr. 5 og § 13, stk. 2 er soljóðandi:
>
> "§ 13. Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi
> ...
> 5)
> fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella
> ...
>
> Stk. 2. Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."

Fyri at fáa greiðu á viðgerðini hjá Fíggjarmálaráðnum av innlitsáheitanini verður Fíggjarmálaráðið biðið um at greiða umboðsmanninum frá, í hvønn mun tær upplýsingar í sáttmálanum, sum Fíggjarmálaráðið ikki hevur givið Kringvarpi Føroya innlit í, eru egnaðar at skaða fíggjarligu áhugamál landsins, um innlit verður givið í tær.

Biðið verður um, at frágreiðingin verður umboðsmanninum í hendi innan 1. september 2014."

Tann 10. september 2014 fekk umboðsmaðurin soljóðandi svar frá Fíggjarmálaráðnum:

**"Frágreiðing í hvønn mun tær upplýsingar í sáttmálanum eru egnaðar at skaða fíggjarligu áhugamál landsins.**

....

Staðfest er í løgfrøðiliga álitinum og í donskum rættarástøði annars, sí t.d. 'betænkning nr. 857 1978', s 284, at virkisøkið hjá § 13, stk. l, nr. 5 millum annað fevnir um sáttmálagerð millum almennar myndugleikar og privat vinnurekandi. Avmarking av rættinum til skjalainnlit kann fremjast, tá hetta er mett neyðugt fyri at verja fíggjarligu áhugamálini hjá tí almenna móti skaðiligari ávirkan og at verja framtíðar leiklutin hjá tí almenna sum trúverdigur samráðingarpartur. Ein noktan av innliti vísandi til § 13, stk. l, nr. 5 krevur sostatt, at áhugamálini hoyra til fíggjarligu áhugamálini hjá tí almenna, og at atlitið til hesi áhugamál harafturat er týðandi. Royndir vísa, at ikki krevst nógv, fyrr enn innlit kann noktast á hesum grundarlagi, sbr. Jon Andersen, Offentlighed i forvaltningen, 2013, s. 310.

Vísast kann í hesum sambandi til skriv frá danska umboðsmanninum, 22. mars 1979 nevnt í Offentligshedsloven med kommentarer, s. 215, í einum máli viðvíkjandi skjalainnliti í avtalu millum DONG og Dansk Undergrunds Consortium:

> 'Det fremgår af de foreliggende oplysninger ... at den væsentligste begrundelse for afslaget (på aktindsigt) er hensynet til den danske stats og DONG's muligheder for i fremtiden at varetage nødvendige samfundshensyn, idet en offentliggørelse af kontrakten ville indebære en risiko for, at DONG fremtidig ville kunne blive opfattet som en ikke-seriøs forhandler, og at det desuden i tilfælde af offentliggørelse af kontrakten måtte forventes, at DONG ville blive afskåret fra opnåelse af særligt begunstigende vilkår i kommende kontrakter.'

I FOB 1994.414 greiðir umboðsmaðurin millum annað soleiðis frá um virkisøkið hjá § 13. stk. l, nr. 5 og viðurskiftum kring fíggjarligu áhugamálini hjá tí almenna.

> (...)
> Anvendelse af undtagelsesbestemmelsen i offentlighedslovens § 13, stk. 1, nr. 5, forudsætter dels at interessen efter sin art kan henregnes til "det offentliges økonomiske interesser", dels at interessen i at begrænse aktindsigt i en oplysning konkret er væsentlig. Forarbejdernes eksempler på økonomiske interesser som efter deres art anses for omfattet af undtagelsesbestemmelsen, vedrører navnlig økonomiske interesser i forbindelse med kontraktindgåelsen. Uanset dette mener jeg ikke at det kan antages, at der gælder særlige begrænsninger i arten af de økonomiske interesser, som er omfattet af bestemmelsen. Efter min opfattelse er også økonomiske interesser som knytter sig til perioden efter kontraktindgåelsen, dvs. under selve kontraktforløbet, ved kontraktforholdets ophør og under eventuelle retssager som følge af kontraktforholdet, efter deres art omfattet af bestemmelsens anvendelsesområde (...)

Í løgfrøðiliga álitinum frá D, kom hann til hesa niðurstøðu:

> ‘Hovedproblemstillingen for dette responsum er, hvorvidt det er berettiget med hjemmel i offentlighedslovens § 13, stk. l, nr. 5, at afslå en anmodning om aktindsigt i et udkast til koncessionsaftale om en vej- og tunnelforbindelse med tilhørende tilslutningsveje under Skálafjarðar og Tangafjørður - eller om der skal gives aktindsigt, herunder delvis aktindsigt i medfør af offentlighedslovens § 13, stk. 2.
>
> Det er min konklusion, at det er berettiget at tilbageholde (undtage) væsentlige dele af aftaleudkastet i henhold til offentlighedslovens § 13, stk. l, nr. 5, men at der samtidig i aftaleudkastet er en række standardoplysninger mv., som uden nogen skadevirkning for det offentliges økonomiske insteresser, herunder hensynet til at kunne optræde som ligestillet eller seriøs forhandlingspart, kan videregives i forbindelse med aktindsigt. Der skal derfor gives aktindsigt heri, jf. Offentlighedslovens § 13, stk. 2.

Vísandi til omanfyrinevndu niðurstøðu og í tráð við givnar grundgevingar annars, metir Fíggjarmálaráðið, at sáttmálin hevur samband við fíggjarligu áhugamálini hjá tí almenna, og at viðurskiftini framvegis ítøkiliga eru mett at vera týðandi fyri framtíðar samráðingarstøðuna hjá tí almenna og tess møguleikum frameftir at bera seg at sum ein javnborin og trúverdigur samráðingarpartur.

At landsstýrið hevur valt ein annan leist at byggja og fíggja tunnilsverkætlanina, enn tann ætlaða leistin í hesum sáttmála, hevur ítøkiliga ikki ávirkan á hesa meting. Viðvíkjandi tunnilsverkætlanini, herundir fíggingarmøguleikum og útinnan av verkætlanini annars, kann verða víst til almennu viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 77/2013.”

Tann 11. september 2014 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Hetta mál byrjaði við eini klagu um viðgerðartíðina av einari umsókn um innlit. Ikki fyrr enn klagað var til mín, fekk klagarin innlit í hetta mál. Tá hevði klagarin bíðað meira enn ein mánað eftir at fáa innlit. Eg haldi ikki, at tað er nøktandi, at henda innlitsumbøn ikki varð svarað, fyrr enn eg kom inn í málið. Tað er í § 16, stk. 1 í innlitslógini ásett, at ein myndugleiki sum skjótast skal gera av, um ein áheitan um skjalainnlit kann verða gingin á møti. Myndugleikarnir hava sostatt eina serliga lógarásetta skyldu at svara innlitsumbønum skjótast gjørligt, og er tað av serligum týdningi, at fjølmiðlar fáa skjalainnlit í mál so skjótt sum gjørligt.

Viðgerð mín av hesari klagu snýr seg um, hvørt Fíggjarmálaráðið hevur strikað út ov nógvar upplýsingar í CIP-sáttmálanum, sum klagarin, tann 11. februar 2014, fekk innlit í.

Umboðsmaðurin hevur heitt á Fíggjarmálaráðið um at greiða frá, í hvønn mun tær upplýsingar í sáttmálanum, sum Fíggjarmálaráðið ikki hevur givið Kringvarpi Føroya innlit í, eru egnaðar at skaða fíggjarligu áhugamál landsins, um innlit verður givið í tær. Til hetta svarar Fíggjarmálaráðið, at royndir vísa, at ikki krevst nógv, fyrr enn innlit kann noktast á hesum grundarlagi. Hesum eri eg ikki samd við Fíggjarmálaráðnum í.

Útgangsstøðið í innlitslógini er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl og upplýsingar, og tað krevst ein lógarheimild fyri at sýta eini umsókn um innlit. Fíggjarmálaráðið vísir, í avgerð sínari at avmarka innlit í sáttmálan, til § 13, stk. 1 nr. 5 í innlitslógini.

§ 13, stk. l, nr. 5 í lógini um alment innlit er soljóðandi:

> "Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi
> ...
> 5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella
> ..."

§ 13, stk. 2 í lógini um alment innlit er soljóðandi:

> "Um umstøður, sum nevndar í stk.l bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."

Treytin fyri at avmarka rættin til skjalainnlit eftir § 13, stk. 1, nr. 5 er tó, at myndugleikin ger sær eina ítøkiliga meting av, um sannlíkindi eru fyri einum fíggjarligum tapsvanda hjá tí almenna.

Eg havi lisið sáttmálan og sæð tey brot, sum Kringvarp Føroya hevur fingið innlit í. Eftir mínari meting eru óneyðuga nógv brot strikað úr sáttmálanum. Hesi brot innihalda ikki upplýsingar, sum kunnu skaða fíggjarligu áhugamálini hjá landinum. Eg haldi ikki, at Fíggjarmálaráðið í hesum sambandi hevur gjørt nakra ítøkiliga meting av vandanum fyri, hvussu innlit kann skaða fíggjarligu áhugamálini hjá landinum.

Fíggjarmálaráðið sigur harafturat í frágreiðingini til mín, at viðurskiftini framvegis ítøkiliga eru mett at vera týðandi fyri framtíðar samráðingarstøðuna hjá tí almenna og tess møguleikum frameftir at bera seg at sum ein javnborin og trúverdigur samráðingarpartur. Til hetta er at siga, at avtalan um gerð av einum undirsjóvartunnli er ein so serstøk avtala, at hon ikki kann sigast at fella inn undir tað vanliga virksemið hjá landinum. Eg dugi tí ikki at síggja, at framtíðar samráðingarstøðan hjá tí almenna á nakran hátt er í vanda av hesari orsøk.

Eg fari at heita á Fíggjarmálaráðið um at taka hetta málið upp til nýggja viðgerð og lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Burtursæð frá omanfyristandandi viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið í løtuni.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður